# Javnt í triðja umfarinum

*Triði og seinasti dysturin millum Føroyar og Grønland endaði við javnleiki, men tað var ikki fyrr enn í seinastu sekundunum av dystinum, at Jacob Larsen, sum bert leikti við henda dystin, kundi tryggja Grønlandi javnleikin*




*Í triðja dystinum megnaðu grønlendingar í nógv størri mun at verja fyri føroyingunum, men tað var ikki fyrr enn í seinastu sekundunum, at teir tryggjaðu sær javnleikin*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

Føroyar-Grønland 29-29 (17-16)

Hóast føroyingar høvdu vunnið teir báðar fyrru dystirnar móti grønlendingunum, og hóast styrkismunurin hevði verið rættuliga sjónligur í seinna dystinum, so var ikki sørt av spenningi undan triðja og seinasta dystinum landanna millum.

Spenningurin komst av, at Jacob Larsen, sum dagliga leikar við GOG í bestu donsku deildini, var komin upp til hendan dystin.

Danskur hondbóltur er jú á einum væl hægri støði enn tann føroyski, so lítið var at ivast í, at hetta fór at verða ein munandi styrkur hjá grønlendingum.

Hetta sást eisini á áskoðarafjøldini, sum var væl størri enn til hinar báðar dystirnar, ella kanska var tað bara tað, at Vestmanna er ein rættulig hondbóltsbygd.

### Javnari enn áður

Skjótt gekk eisini sjón fyri søgn, at talan veruliga var um ein leikara, sum styrkti um grønlendska liðið. Serliga í verjupartinum var stóri og sterki leikarin ein fongur, og tað vórðu eisini gestirnir, sum fingu tað betri byrjanina hesu ferð.

Føroyingarnir sleptu tó ongantíð takinum, men megnaðu alla tíðina at varveita sambandi við mótstøðuliðið, og tá hálvleikurin var á leið hálvrunnin, megnaðu okkara leikarar at vinna seg fram um mótstøðuliðið.

Føroyska liðið var aftur eitt sindur umskipað í mun til leygardagin. Hesu ferð vóru Óla Kristian og Hans Áki ikki við í hópinum. Í málinum slapp Jens Skipagøta at royna seg frá byrjan av dystinum, og hóast hann ikki stóð eins væl og Jóhan og Óla Kristian hvødu gjørt í undanfarnu dystunum, so hevði hann tó nakrar bjargingar.

Í álopspartinum var aftur líkt til, at Føroyar í stóran mun máttu líta á avrikið hjá Inga Olsen, men hinvegin vóru eisini aðrir leikarar, sum gjørdu um seg. T.d. royndi Bjarni seg á miðjuni eina løtu í fyrra hálvleiki, og hóast honum enn væntar nakað, áðrenn hann kann sammetast við Inga, so er eyðsæð at vit her hava ein leikara, sum við tíðina kann mennast til henda leiklutin.

Eftir at føroyingar megnaðu at vinna seg fram um miðskeiðis í hálvleikinum, skiftust liðini bæði at skora, og munurin var bert eittans mál, tá farið varð til hálvleiks.

### Javnaðu við seinasta skotinum

Í seinna hálvleiki vórðu tað føroyingar, sum byrjaðu betur, og eitt skifti høvdu leikarar okkara vunnið sær eina trý máls stóra leiðslu. Eli Müller stóð nú í málinum, og hann prógvaði enn einaferð síni ótrúligu evni, tá tað ræður um at verja fyri brotskøstum. Tvær ferðir á rað fingu grønlendingar nevnliga tillutað brotskast, men í báðum førum bjargaði vestmenningurin.

Miðskeiðis í seinna hálvleiki fór tó at gangast betri hjá gestunum, og eftir lítlari løtu høvdu teir aftur tikið seg fram um føroyingarnir. Sámal og Bjarni, sum nú royndi seg á vinstra vongi, syrgdu tó fyri, at Føroyar aftur vóru eitt mál framman fyri, men grønlendingarnir mistu tó ikki á nakran hátt mótið, men royndu framhaldandi at venda dystinum til egnan fyrimun.

Føroyingar megnaðu tó at koma fram um bæði 28-27 og 29-28. Hetta seinni tá bert fá sekund vóru eftir at leika. Grønlendingar fóru tó aftur í álop, og við trimum sekundum eftir á klokkuni, fingu teir tríggja metra kast, og fekk Rúni Poulsen í sama viðfangi reyða kortið at síggja, við tað at hann varð heldur harðligur, tá hann royndi at steðga seinastu grønlendsku álopsroyndini.

Grønlendska liðið stillaði upp, soleiðis at Peter Sikemsen, sum hesar tríggjar dagarnar hevði givið fleiri dømi upp á sítt góða avsett, skuldi skjóta. Royndin miseydnaðist, men dómararnir bríkslaðu enn einaferð fyri trimum metrum. Hesu ferð royndi Jacob Larsen seg, og uttan stórvegis hóvasták, langaði hann bóltin í føroyska málið.

### Ónøgd við dømingina

Sum vera man, so var rómurin á grønlendsku leikarunum sera góður, nú tað loksins eydnaðist at fáa okkurt burtur úr dystinum, men eftir dystin skiltist á grønlendska venjaranum, at eftir hansara tykki áttu teir at vunnið dystin.

Í prátið við Útvarpið gav hann nevnliga til kennar, at dómararnir í øllum førum ikki høvdu verið ímóti føroyingunum seinastu løtuna av dystinum, og heilt skeivt man venjarin ikki hava í hesum.

Seinastu minuttirnar hendi tað nevnliga fleiri ferðir, at dømingin bar brá av at vera til fyrimuns fyri føroyingar. Nú skal eg ikki siga, at dómararnir vóru partískir við vilja, men í øllum førum vóru nakrir av seinastu dómunum løgnir.

Spell at hetta at enda kom at seta dám á dystin, tí talan var annars um ein sera góðan og undirhaldandi dyst, sum í mun til teir báðar undanfarnu var spennandi frá fyrsta til seinasta bríksl.

Stóri munurin í mun til teir báðar undanfarnu dystirnar var helst tann, at grønlendska liðið nú hevði Jacob Larsen afturat sær.

Í verjupartinum var hann sera drúgvur, hóast Ingi enn einaferð kundi gerast toppskjútti hjá føroyska liðnum, og í álopspartinum merkti hetta eisini, at grønlendingar gjørdust nógv hvassari.

Sjálvur skeyt hann seks av grønlendsku málunum, men serliga Peter Sikemsen dugdi at gera sær dælt av, at føroyingarnir ansaðu somikið væl eftir GOG leikaranum, og maðurin við stóra avsettinum skeyt ikki færri enn 12 mál hesu ferð.

### Hóskandi mótstøða

Triði dysturin prógvaði, at talan var um hóskandi byrjan á altjóða farleiðini, tá HSF gjørdi av, at Grønland skuldi verða fyrsta landið, sum A-landslið okkara skuldi royna seg ímóti.

Serliga í dystinum leygardagin, vóru tekin um, at grønlendska var heldr veikt til okkara menn, men spurningurin er helst, hvussu okkara menn høvdu staðið seg, um vit noyddust at vera tríggjar týðandi leikarar fyri uttan.

Samanumtikið má sigast, at talan var um eitt væleydnað tiltak, og vónandi kann hetta gerast byrjanin til eitt nýtt tíðarskeið í føroyskari hondbóltssøgu.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Føroyar: Ingi Olsen 12 (1), Bjarni Wardum 5, Sámal Joensen 4, Heini Joensen 4, Áki Olsen 3 (1), Martin Hummeland 1
Grønland: Peter Sikemsen 12 (2), Jacob Larsen 6, Hans P. Poulsen 4, Hans Knudsen 3, Rasmus Larsen 2, Finn Nielsen 1, Kim Hovgaard 1
**Brotskøst:**
Føroyar 4, Grønland 4
**Útvísingar:**
Føroyar 3, Grønland 5
**Diskvalifikatión:**
Føroyar 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar úr Stjørnuni:**
Geir Wardum og Carsten Andersen



*Bjarni Wardum royndi seg eisini sum vongspælari í triðja dystinum, og fekk hann fleiri mál burtur úr hesum*

***Mynd: Álvur Haraldsen***



# Ein ljós framtíð

*15 mans sluppu at vísa síni kynstut í teimum trimum landsdystunum, og eingin ivi er um, at Ingi Olsen var leikarin, sum skaraði fram um hinar 14. Hinvegin er eingin av leikarunum, sum fær dumpikarakter fyri avrikið, og verður lági miðalaldurin havdur í huga, kann staðfestast, at føroyskur hondbóltur gongur eini ljósari framtíð á møti.*

Jákup Mørk

### Eli Müller, VÍF

Var tann føroyski málverjin, sum fekk fægstar minuttir á vøllinum, men megnaði kortini í seinasta dystinum at prógva, at hann avgjørt telist millum bestu málverjarnir í landinum. Harumframt hevur hann ein ótrúligan eginleika til at bjarga brotskøstum, og hesum prógvaði hann enn eina ferð sína stóru styrki

### Jóhan Danielsen, StÍF

Prógvaði í fyrsta dystinum, at hann helst er fremsti hondbóltsmálverji okkara. Snøgt sagt varð hann í tí dystinum munurin á liðunum. At hann eisini er tann málverjin, sum Palli Joensen hevur besta álitið á, sæst eisini aftur í, at hann var einasti málverjin, sum var í hópinum allar dystirnar.

### Jens Skipagøta, H71

Vardi málið eina løtu í dystinum leygardagin, men tá vildi einki rigga hjá honum. Byrjaði kortini í dystinum sunnudagin, og hevði tá nakrar bjargingar, hóast hann heldur ikki tá leikti upp til sítt besta. Hann hevur tó fleiri ferðir fyrr prógvað, at hann eigur at vera ein náttúrligur partur av landsliðnum

### Óla Kristian Djurhuus, KÍF

Vardi føroyska málið meginpartin av leygardagsdystinum, og átti sín part av æruni fyri, at tað eydnaðist at steingja føroyska málið í 15 minuttir. Eftir at Jens hevði loyst hann av eina løtu, kom hann aftur á vøllin, men tá var sum um rútman var brotin, og kom hann tí ongantíð upp á heilt sama støði aftur.

### Sámal Joensen, VÍF

Var rættuliga óstøðugur í spæli sínum. Fríggjadagin var hann so at siga ógjørligur at steðga, og fekk mál burtur úr øllum. Leygardagin vildi ikki eins væl til, meðan sunnudagurin tó var á eini leið. Royndi seg eisini sum høgra bakk, uttan at hetta tóktist at nerva tað stóra. Er við stødd síni ein týðandi liður í føroyska verjuspælinum.

### Áki Olsen, Neistin

Ein hevði kanska væntað sær fleiri mál frá hansara høgru hond í hesum landsdystum, men hinvegin eigur avrik hansara ikki at undirmetast, tí í fleiri førum var tað hann, sum stóð fyri uppspælinum til føroysku skotroyndirnar. Serliga í fyrsta dystinum var hann eisini drúgvur í verjupartinum, har hann vanliga ikki hevur

### Petur Martin Poulsen, KÍF

Royndi seg á heldur óvanda plássinum sum vinstri vongur, og spæl hansara var eisini merkt av hesum. Royndist tó drúgvur í verjupartinum, har hann hevði gott tak á mótstøðumanni sínum. Kann uttan iva menna seg nógv á plássinum, soleiðis at hann eisini í framtíðini verður fastur fúsur á landsliðnum

### Rúni Poulsen, Kyndil

Var við í fyrsta dystinum, og stóð seg væl í verjuspælinum, har hann tó hevði trupulleikar av stóra mótstøðumanninum. Flutti seg skilagott í álopssælinum, men skotroyndir hansara vóru ikki nóg neyvar. Fekk reytt kort í seinasta dystinum, men hevði seinasta grønlendska skotið ikki givið mál, høvdu tey flestu helst takkað honum fyri, at hann steðgaði álopsroyndini.

### Bárður Brimvík, H71

Var sum einasti strikuspælarin við í øllum trimum dystunum, og royndist hann hampuliga væl í bæði álops- og verjupartinum. Hevur støddina við sær, og megnaði tískil eisini at berjast við vælvaksna Rasmus Larsen. Brendi fleiri góðar møguleikar í fyrsta dystinum, men var nógv neyvari í teimum báðum seinnu.

### Janus Einar Sørensen, Kyndil

Prógvaði at hann helst er besti strikuspælari okkara í løtuni. Loftar so at siga øllum bóltum í álopspartinum, og roynist eisini sera drúgvur í verjupartinum. Varð tikin úr U18 hópinum, og hevur longu prógvað, at venjarin sá rætt, tá hann tók hesa avgerð. Fer uttan iva at teljast millum teirra, sum føroyska liðið skal byggjast á í framtíðini.

### Ingi Olsen, VÍF

Liðskiparin á føroyska liðnum, var klárt besti leikarin í teimum trimum dystunum. Var sera sjónligur í álopspartinum, har hann fyri tað mesta royndi seg sum miðspælara, og var toppskjútti í øllum dystunum. Var eisini ein týðandi liður í føroyska verjuspælinum, har hann við kvikleika sínum fekk pilkað nógvar bóltar frá grønlendsku leikarunum.

### Heini Joensen, Neistin

Byrjaði við buldur og brak, tá hann skeyt trý tey fyrstu føroysku málini, og var í øllum dystunum ein stór hóttan, orsakað av stóru skotstyrkini. Hevur tó hug at gera spælið ov torført við hvørt, og serliga í fyrsta dystinum kostaði hetta nøkur kontramál. Líður tó undir, at føroyska liðið hevur ov fáar lámar, og fær tí ov lítið av hvíld undir dystinum.

### Martin Hummeland, VÍF

Slap at royna seg í teimum báðum seinnu dystunum, og við skjótleika sínum megnaði hann fleiri ferðir at hótta mótstøðuliðið. Er kanska í so smæðin í álopspartinum, men eingin ivi er um, at hetta kemur saman við vaksandi royndunum. Hevur tó ikki enn megnað at sett seg á plássið sum høgri vongur

### Bjarni Wardum, Kyndil

Einasti Wardum-maðurin á landsliðnum prógvaði í øllum trimum dystunum, at hann kann spæla á so at siga øllum plássum. Sýndi dirvi og vilja at bróta ígjøgnum, hóast hann kanska var heldur ótolin til tíðir. Hevur bæði bóltførleika og yvirlit til at gerast arvtakarin til miðplássi, tá Ingi Olsen einaferð ger av seta skógvarnar á hillina.

### Hans Áki Dahl Christiansen, Kyndil

Var ikki við í seinasta dystinum, men hevði longu tá sýnt, at hann iegur at vera fastur fúsur á A-landsliði okkara. Ein kundi kanska hugsað sær, at hann gjørdi meira av í álopspartinum, men í verjupartinum lá hansara lutur so avgjørt ikki eftir. Varð í fleiri førum fyrsti maður at støðga mótstøðuálopunum, men verður kanska í so altráður við hvørt.



*Onkuntíð høvdu grønlendingar hug til at vera heldur harðligir við Inga Olsen, sum helst varð besti føroyski leikarin í teimum trimum dystunum*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

# Væl nøgdur

*Hóast úrslitini kanska kundu verið betur, var grønlendski venjarin, Bo Roy, væl nøgdur við dystirnar*

Jákup Mørk

Eftir triðja og seinasta landsdystin á hesum sinni, hittu vit Grønlendska landsliðsvenjaran, Bo Roy, og spurdu vit hann, hvat hann helt um teir tríggjar dystirnar.

Samanumtikið helt hann, at grønlendska liðið hevði havt stóra gleði av hesum dystum, men hann helt ikki, at spælið í teimumbáðum fyrstu dystunum hevði verið nøktandi.

Hann legði tó afturat, at breiddin á liðnum ikki var nóg góð, og at tað tískil kendist sera stríggið, at tríggir av bestu leikarunum ikki vóru tøkir.

Seinasta dystin var Jacob Larsen tó at síggja á liðnum, og hetta helt venjarin eisini bøtti munandi um grønlendska spælið.

### Gott lið

Annars segði Bo Roy, at føroyska liðið var betri, enn hann hevði væntað.

- Fyrr vóru føroyingar nakrir lítlir og kvikir leikarar, sum leiktu skjótan hondbólt, men leikararnir, sum tit nú hava, hava so sanniliga fingið eitt sindur av havragreyti, ella hvat tit so eta her uppi, helt venjarin fyri, og legði samstundis afturat, at hann serliga hevði bitið merki í Inga Olsen, Heina Joensen, Sámal Joensen og Bárð Brimvík.

- Tað týdningarmesta hjá okkum var tó, at vit aftur fingu høvi at samlast, segði grønlendski venjarin, sum at enda ynskti føroyska liðnum góða eydnu framyvir, eins og hann vónaði, at hetta ikki vórðu seinastu dystirnir landanna millum.




STEYP OG HEIÐURSTEKIN

Nógv nýtt heimkomið

Vit hava stórsta úrvalið innan steyp og heiðurstekin í Føroyum.
Vit skulu eisini gera vart við at vit hava stórar møguleikar innan gravering av steypum og heiðursmerkjum. T.d. kunnu vit gravera búmerki hjá tykkum og annars alt tað vanliga.



Vit síggjast í 3-aranum

NB. Vit gravera eisini navnaskeltir v.m. til el-talvur, hurðar o.a.

3arin
SMS • Tel. 31 98 20 - 31 06 06
Fax 31 49 55
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820